# Marin Katrina Frýdal forkvinna í Teknisku nevnd

Á fundi fyrradagin hevur tekniska nevnd Tórshavnar býráðs skipað seg við Marin Katrinu Frýdal úr Tjóðveldi sum forkvinnu og Levi Mørk úr Javnaðarflokkinum sum næstformanni. m,Hinir nevndarliminir í teknisku nevnd Tórshavnar býráðs hetta skeiðið eru Jákup Símun Simonsen úr Tjóðveldi, Halla Samuelsen úr Javnaðarflokkinum og Sjúrður Olsen úr Fólkaflokkinum. Tekniska nevnd varðar av vegum, gøtum, ferðslu, kloakkum, vatn- og ljósveitingum, skúlakoyring og Bussleiðini í Tórshavnar kommunu.



# 11.300 arbeiðsleysir íslendingar

Arbeiðsloysið í Íslandi veksur í hvørjum. Tey seinastu tølini hjá Vinnumálastovninum siga, at 11.305 fólk eru skrásett sum arbiðsleys. Talan er um 7.101 menn og 4.204 kvinnur. Yvirlitið hjá stovninum vísir eisini, at nógv tey flestu arbeiðsleysu ella næstan 7.000 búgva í høvuðsstaðnum Reykjavík og har um vegir. Vinnumálastovnurin sigur, at arbeiðsloysið vaks heili 45 prosent frá november til desember, og stovnurin væntar framhaldandi vøkstur og serliga í byggivinnuni og tænastuvinnunum.



*Igor Chernyshenko og Bárður Enni hava júst undirskrivað samstarvsavtaluna*

# Boykottið er av

**Heilsufrøðiliga starvsstovan og Rosselkoznadsor hava í gjár undirskrivað samstarvsavtalu. Avtalan inniber at føroyingar nú aftur kunnu útflyta fisk og fiskavørur til Russlands**

FISKIVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Heilsufrøðiliga starvsstovan skrivar á heimasíðu síni í gjár, at samstarvsavalan nú er undirskrivað, og tískil er innflutningsbannið frá 1. september 2008 nú endiliga av.

Hesin útflutningur kann byrja aftur tá russar hava góðkent okkara lista yvir virki og boða sínum marknaðareftirlitsstøðum frá hesum og at skabelónin til heilsuváttanir er góðkend av russisku myndugleikunum. Um alt gongur sum ætlað er hetta komið í rættlag innan ein mánaða.

Samstarvsavtalan skal tryggja, at russar fáa dygdagóðan fisk og fiskavørur av føroyskum uppruna, ið er framleiddar á virkjum og skipum, sum umframt føroysk krøv eisini lúka russisk heilsufrøðilig krøv. Eisini varð staðfest, at galdandi mannagongd í sambandi við umlasting av feskum alifiski kann halda fram.

### Vísa føroyingum álit

Russar løgdu dent á, at teir hava álit á heilsufrøðiligu myndugleikunum í Føroyum. Teir løgdu í okkara hendur, at gera ein lista við virkjum, sum lúka russisku lóggávuni. Hesin listi verður sendur Rosselkoznadsor til góðkenningar. Ikki er neyðugt við russiskari eftirlitsvitjan, áðrenn virkini kunnu byrja útflutning til Russlands.

Russiski myndugleikin kemur møguliga aftur á eftirlitsvitjan einaferð síðst í árinum. Tá velja tey nøkur virki á listanum at hyggja nærri eftir. Um hesi útvaldu virkini lúka heilsufrøðiligi krøvini, verður hetta ein staðfesting av tí áliti, sum russar hava víst føroysku eftirlitsskipanini og virkjunum sum heild.



*Føroyska og russiska samráðingarnevndin*

# Í tøkum tíma

**Tað er í tøkum tíma, at tíðindini komu um at russiska boykottið er av. – Lága norksa krónan ger, at vit kunnu missa upp til 300 milliónir um árið, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelagi**

FISKIVINNA
*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*

Í gjár boðaði Heilsufrøðiliga Starvsstovan frá, at samstarvsavtala er undirskrivað við russar um heilsufrøðiligu góðkenningarnar av føroyskum virkjum og skipum. Avtalan inniber at føroyingar aftur kunnu útflyta fisk og fiskavørur til Russlands. Gongur alt sum ætlað, er alt komið í rættlag innan ein mánað.

Formaðurin í Havbúnaðarfelagi Føroya, Ragnar Joensen, fegnast um góðu tíðindini.

- Nú eru vit aftur har, vit vóru áðrenn september. So vit eru, sum vera man, glaðir um tíðindini, sigur Ragnar Joensen.

Tað hevur verið ein stórur partur av føroyska alivinnuútflutninginum, sum hevur verið raktur av russiska boykottinum, og sum nú vónandi kemur í rættlag aftur.

- Tað eru eini 20 prosent av útflutinginum, ið hevur verið seldur til Russlands, og tá útflutningurin er um 50.000 tons, so eru tað jú 10.000 tons, ið vit hava verið noyddir at selja aðrastaðni, greiðir Ragnar Joensen frá.



*Myndatekstur Ragnar Joensen: – Umleið 20 prosent av útflutninginum hjá okkum fór til Russlands áðrenn, so vit eru sera fegnir um avtaluna, sigur Ragnar Joensen, formaður í Føroya Havbúnaðarfelagi*

### Ringt at selja

Tað hevur eftir øllum at døma verið ringt at selja fiskin aðrastaðni hesa seinastu tíðina. Vøksturin hevur verið góður, og alarar hava havt stóran fisk í seinastuni. Prísurin hevur ligið um 2 krónur kilo fyri laks.

- Vit hava ikki verið í sambandi við russiskar keyparar enn, men tað skilst frá normonnum, at Russland eisini eru merktir av kreppuni. So tað er ikki til at vita, hvussu keypararnir eru fyri har, greiðir Ragnar Joensen frá.

Nú er avtalan undirskrivað, og Heilsufrøðiliga Starvsstovan skal gera ein lista yvir tey virki, ið lúka krøvini, og boða russum frá. Roknað verður við at tað verða eini 14 dagar, áðrenn fyrstu útflytararnir aftur kunnu selja til Russlands.

### Í tøkum tíma

Tað var eftir øllum at døma í tøkum tíma at hesi tíðindini komu.

- Vit fara beint í gongd við at taka sambandið uppaftur við russiskar fiskakeyparar. Beint tá boykottið kom, stóð russiski marknaðurin í stórum vøkstri, og hann var sera áhugaverdur fyri okkum. Meginparturin av tí, sum vit seldu til Russlands, varð eisini betalt kontant, men hvussu tað verður við tí nú, er ikki til at vita, greiðir Ragnar Joensen frá.

Seinastu tíðini hevur norska krónan verið sera lág, og hevur tað eisini ávirkað kappingarførið hjá føroysku útflytarunum.

- Tað at norska krónan er so lág mótvegis evruni og donsku krónuni ger, at vit hava mist 5 til 6 krónur kilo í kappingarføri í mun til normenn. Tá vit útflyta 50.000 tons um árið, so merkir hetta jú eini 300 milliónir krónur um árið, og um gongdin verður soleiðs framyvir, so er eingin kjansur hjá okkum, staðfestir Ragnar Joensen.

Av tí at støðan hevur verið soleiðs í seinastuni, er tað ein vælkomin lætti, at føroyskir alarar skjótt aftur sleppa at útflyta laks og síl til Russlands.